UTTAN ÚR HEIMI

## Søkja eftir manning

Tað hevur ongantíð gingið so væl hjá danska handilsflotanum sum nú, men samstundis vísir tað seg, at reiðaríini hava ilt við at finna egnað fólk til at manna skipini, sigur TV2.

A.P. Møller, sum eigur ella rekur 820 skip av ymsum slagi, plagdi ikki at hava trupult við at manna síni skip, men í seinastuni hevur reiðaríið havt stórar lýsingar í fleiri sjóvinnubløðum, har tað hevur søkt eftir fólki. Jakob Tarnok Larsem, kunningarstjóri, sigur, at reiðaríið hevur fleiri nýbygningar í gerð, og at nú verður roynt at manna tey. Fleiri av teimum nýggju skipunum seta serlig krøv til manningina, og tað ger tað so mikið truplari at finna egnað fólk.

Peter Friis Jespersen, sum er formaður í Søfartens Ledelse, sigur við Ritzau, at tørvurin á yvirmonnum til handilsflotan er stórur.

Sambært Ritzau hava donsk reiðarí bílagt meiri enn 200 nýggj skip fyri einar 70 milliardir krónur. Tilsamans ferma tey umleið 12 milliónir tons, og tey verða latin eigarunum tey næstu trý árini.

## Eitt gott val

Tað kom rættiliga óvart á fleiri, tá svenski forsætisráðharrin, Göran Persson, kunngjørdi, at hann hevði sett diplomatin Jan Eliasson til nýggjan uttanríkisráðharra ístaðin fyri Lailu Freiwalds, sum legði frá sær í síðstu viku.

Jan Eliasson hevur verið diplomatur síðani 1965 og ber orð fyri at vera sera dugnaligur. Ta seinastu tíðina hevur hann verið formaður á ST-aðalfundinum, og hann fær æruna av, at ST-londini samdust um at skipa eitt nýtt ráð, sum skal halda eyga við mannarættindunum kring heimin. Øll limalondini uttan USA atkvøddu fyri uppskoti hansara.

Politiskir eygleiðarar í Stockholm halda, at nú Göran Persson hevur valt Jan Eliasson til uttanríkisráðharra, fær uttanríkispolitikkurin ikki stórvegis týdning í valstríðnum upp undir ríkisdagsvalið, sum verður seinni í ár. Tað hevði verið øðrvísi, um hann hevði valt ein politikara, siga eygleiðararnir.

## Nú gongur betur

Eftir at hava havt fíggjarligar trupulleikar í fleiri ár er vend nú komin í raksturin hjá teimum amerikonsku flogfeløgunum.

Tey seinastu fimm árini hava feløgini mist umleið 250 milliardir krónur. Tann fyrsti ársfjórðingurin í ár gevur eisini hall, men feløgini vænta avlop í øðrum ársfjórðingi, og at at 2006 fer at geva avlop, sigur CNN. Hesin spádómurin er galdandi fyri feløgini American Airlines, United Airlines, Continental Airlines og US Airways.

Orsøkin til gongdina er, at ferðaseðlaprísurin er hækkaður, ferðafólkini eru vorðin fleiri, og feløgini hava skarvað nógv av teimum dagligu útreiðslunum. Tann stóri vansin er, at brennievnið er tríggjar ferðir dýrari enn fyri fýra árum síðani, men kortini vænta feløgini avlop í ár.

## Dýrur laksur

Sunnudagin sluppu fólk aftur at veiða laks í teimum norðursponsku áunum, og eins og onnur ár var áhugin sera stórur.

Tað er nú ikki so løgið, tí øll vilja fáa ársins fyrsta laks, sum verður seldur á uppboði. Í ár var Paulino Fevienza tann hepni. Laksurin, sum hann fekk, vigaði 3,8 kilo, og tá uppboðshaldarin dukaði hamaran í borðið fyri triðju ferð, hevði Paulino fingið einar 85.000 krónur fyri laksin. Kiloprísurin var góðar 22.300 krónur. Blaðið El Pais skrivar, at Paulino Fevienza er ein royndur laksafiskimaður úr býnum Oviedo. Hann fekk laksin í einari á, sum eitur Eo.

Laksafiskararnir í Norðurspania kunnu bara selja tann fyrsta og tann seinasta laskin, sum verður veiddur í veiðitíðini.

# Samgongan verður avgerandi

**Lítil ivi er um, at Kadima verður tann størsti flokkurin aftan á ísraelska tjóðartingsvalið í dag, men tað mest spennandi kemur aftan á valið**

VAL Í ÍSRAEL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Longsulin eftir varandi friði, samkensla við Ariel Sharon og óttin fyri tí broytingum gera, at Kadimaflokkurin hjá Ehud Olmert, forsætisráðharra, fer at vinna ísraelska tjóðartingsvalið í dag. Valhølini lótu upp klokkan seks í morgun, og úrslitið kemur eina ferð í kvøld.

Er tann seinasta veljarakanningin eftirfarandi, fær Kadima 34 av teimum 120 sessunum í tinginum Knesset. Arbeiðaraflokkurin verður næststørstur við 21 umboðum, og tann gamli stjórnarflokkurin Likud fær 14 tinglimir. Tað er kortini ikki vist, at hann verður triðstørstur, tí ein høgrasinnaður flokkur kann sambært kanningini fáa 15 umboð á ting.

Eygleiðarar í Ísrael siga, at júst spurningurin um teir næstu flokkarnar er áhugaverdur, tí teirra úrslit er avgerandi fyri, hvussu tann komandi stjórnarsamgongan fer at síggja út, og hvønn politikk hon fer at reka. Sum er tykist ein samgonga ímillum Kadima og Arbeiðaraflokkin rættiliga sannlík, meðan sjónarmiðini hjá Likud er so nógv øðrvísi enn tey hjá hinum báðum, at flokkurin má haldast at hava sett seg uttanfyri, skrivar Reuter.



*Ehud Olmert, forsætisráðharri, greiddi atkvøðu tíðliga í morgun*

### Tað endaliga stigið

Ehud Olmert hevur undir valstríðnum sagt, at Kadima fer at fullføra ætlanina um at niðurleggja fleiri jødiskar niðursetubygdir á Vestara Áarbakka, soleiðis at markið ímillum Ísrael og tað palestinska økið verður sum markið undan krígnum í 1967, men við nøkrum broytingum. Hesum tekur Arbeiðaraflokkurin undir við. Likud hevur harafturímóti sagt, at eingin niðursetubygd skal niðurleggjast, og at verandi mark skal ikki flytast ein tumma.

Sambært Olmert eigur Ísrael at taka tað, sum hann kallar tað endaliga stigið, og tað er líkt til, at hann fær undirtøku fyri tí báðu megin markið. Sambært einari meiningakanning, sum kom í gjár, halda 76 prosent av ísraelsmonnunum og 73 prosent av palestinunum, at Ísrael eigur at taka seg aftur á Vestara Áarbakka sum lið í einum varandi friði.

Útlitini fyri friði hava annars ikki verið tey bestu, síðani Hamas vann palestinska tjóðartingsvalið, men í gjár segði ein av Hamas-leiðarin, Ismail Haniyah, at Hamas er sinnað at virka fyri varandi friði við Ísrael, um ísraelsmenn sýna sama vilja. Spurningurin er bara, um hann tosar vegna allan Hamas-flokkin, tí sterkar kreftir í flokkinum hava lítlan hug at tingast við Ísrael, skrivar Dagsavisen.

### Fleiri trupulleikar

Men trygdin er ikki tað einasta, sum ísraelsku veljararnir taka støðu til í dag. Vælferðin hevur verið nógv frammi í valstríðnum, og tað er ikki so løgið, tá hugsað verður um, at 20 prosent av fólkinum hava minni enn minstamarkið hjá ST at liva fyri. Ein annar trupulleiki er, at tað vísir seg at vera trupult hjá tilflytarum at fáa fótafesti í Ísrael, hóast landið alment bjóðar øllum jøðum vælkomnum. Harafturat er nógv spart á ymsum almennum økjum so sum almannaøkinum, og hendan gongdin tykist hava gagnað Arbeiðaraflokkinum, sum hevur fingið størri og størri undirtøku í seinastuni.

Tá valhølini lótu upp, var framvegis ivi um 28 tingsessir, tí 20 prosent av veljarunum høvdu ikki avgjørt, hvar tey skuldu seta krossin. Sambært blaðnum Haaretz er sannlíkt, at teir flestu fara til Kadima og Arbeiðaraflokkin, tá saman um kemur.

# Kendur njósnari deyður

**Svenski stórnjósnarin Stig Wennerström er deyður. Hann var 99 ára gamal**

NJÓSNING

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Stig Wennerström var oberstur í svenska flogvápninum, men í 1963 bleiv hann tikin og skuldsettur fyri at hava njósnast fyri Sovjetsamveldið. Kanningarnar avdúkaðu, at hann hevði verið sovjetskur njósnari líka síðani 1948, tá hann hevði arbeitt á svensku sendistovuni í Moskva eitt tíðarskeið.

Sum oberstur í flogvápninum hevði hann atgongd til nógvar hernaðarligar upplýsingar, og sovjetski áhugin fyri honum gjørdist ikki minni, tá hann í 1952 fór at arbeiða á svensku sendistovuni í Washington. Í 1957 fekk Stig Wennerström sæti í einari týðandi svenskari hernaðarnevnd, og seinni fór hann at arbeiða í uttanríkisráðnum í Stockholm.

Øll árini njósnaðist hann fyri Sovjetsamveldið, men í 1963 varð hann tikin og dømdur lívlangt revsiarbeiði. Dómurin bleiv seinni broyttur til 20 ára revsiarbeiði, men í 1974 fekk Stig Wennerström grið og varð latin leysur.